***Viðtøkur fyri Havnar Jazzfelag***

1. grein
Navn felagsins er Havnar Jazzfelag og heimstaður tess er Tórshavn

2. grein
Endamál felagsins er at fremja og nøra áhugan fyri tónleiki, serliga jazz, fólk og beat, og at fáa limum sínum eitt fjølbroytt úrval av tónleiki.

3. grein
Dagliga virki felagsins verður fyristílað av nevnd, sum verður vald á aðalfundi fyri eitt ár i senn. Nevndini er heimilað at taka sær til hjálpar starvsfólk.

4. grein
Nevndin hevur rætt til at greiða allar vanligar spurningar, felagnum viðvíkjandi. Tá nevndin ikki setur seg føra fyri at viðgera ein fyri felagið týdningarmiklan spurning, verður hesin avgjørdur á eykaaðalfundi ella aðalfundi.

5. grein
Aðalfundur hevur hægsta vald í øllum felagsmálum. Hann verður hildin á hvørjum ári í januar-februar og skal fráboðast tvær vikur frammanundan.
Dagsskráin til aðalfundin er hendan:
a. val av fundarstjóra
b. formaðurin greiðir frá virki felagsins í farna árinum
c. grannskoðaður roknskapur lagdur fram
d. val av 3 persónsevnd, 3 tiltakslimum og 1 grannskoðara.
e. innkomin mál

6. grein
Eykaaðalfundur, ið verður lýstur eins og regluligur aðalfundur, skal verða hildin, tá meiriluti í nevndini ynskjir tað.

7. grein
*Formaðurin* hevur ta dagligu leiðsluna av felagnum. Hann/hon boðar til nevndarfundar, tá ið hann heldur tað vera neyðugt. Formaðurin teknar felagið.

*Kassameistari* skal føra roknskap felagsins. Hann skal gjalda rokningar, ið koma til felagið. Hann skal á hvørjum ársaðalfundi gera upp roknskap felagsins.

*Skrivarin* skal gera fundarfrágreiðing frá øllum nevndarfundum og øðrum fundum.

9. grein

*Limatekning.*

Limir kunnu tekna seg við at seta seg í samband við felagið og til tiltøk felagsins. Limir fáa kunning um tiltøk og annað í sambandi við virksemi felagsins umframt serlig tilboð viðhvørt.

Limaskapur er ókeypis. Limir hava møguleika til sjálvboðið at taka lut í virkseminum á trá við endamálið hjá Havnar Jazzfelag, sum lýst í 2. grein.

10. grein

Figgjarár felagsins gongur frá 1. januar til 31. desember.

11. grein

Um felagið loysist upp, verða ognir tess latnar felagsskapi ella stovni i Tórshavn, ið hevur liknandi endamál sum Havnar Jazzfelag.

12. grein

Hesar viðtøkur kunnu einans broytast á aðalfundi ella eykaaðalfundi.

*Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundinum hin 21. april 1976 við broytingum samtyktum á aðalfundi hin 9. januar 1980, hin 17. september 1981, 20. oktober 1982, 11. mars 1989, 25. februar 2017 og 19. mai 2022.*